# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Vit viðurkenna ikki Mikheil Saakasjvili sum forseta í Georgia. Hann er ikki annað enn eiott politiskt lík*

*Dmitrij Medvedev, forseti*

# Fimm kvinnur jarðaðar livandi

**Tríggjar ungar kvinnur í Pakistan vildu sjálvar sleppa at gera av, hvørjum tær skuldu giftast við. Tað kostaði teimum og tveimum tilkomnum kvinnum lívið**




*Fyrradagin mótmæltu fólk, at tær fimm kvinnurnar blivu jarðaðar livandi*
*Mynd: Polfoto*

Tær fimm kvinnurnar vórðu jarðaðar livandi í bygdini Babakot í útsynningspartinum av Pakistan fyri meiri enn einum mánaði síðani, men ikki fyrr enn nú eru myndugleikarnir farnir at kanna málið, skrivar bretska blaðið The Independent. Sambært blaðnum hevur løgreglan tikið trý fólk, sum skulu hava havt við illgerðina at gera.

Tær tríggjar ungu kvinnurnar, sum vóru tannáringar, vildu sjálvar sleppa at gera av, hvørjum tær skuldu giftast við. Tað vildu familjurnar ikki góðtaka, og genturnar vórðu tiknar og burturfluttar. Tvær kvinnur, 38 og 45 ára gamlar, sum stuðlaðu teimum trimum ungu, vórðu eisini tiknar og fluttar burtur.

Mannarættindafelagsskapir siga, at tær fimm kvinnurnar vórðu fluttar til eitt fjarskotið stað. Har vórðu tær bukaðar og skotnar. Tær doyðu kortini ikki av skotunum, men vórðu tveittar niður í eina grøv og jarðaðar livandi.

Málið er ikki komið alment fram fyrr enn fyri nøkrum døgum síðani, og fyrradagin gingu fólk, sum eru fyri javnrættindum millum kynini, mótmælisgongu í býunum Lahore og Karachi. Landspartastjórnin í Sind hevur fordømt illgerðina, men teir lokalu politikararnir í Balutsjistanlandspartinum siga, at tilburðurin er ein partur av einum elligomlum siði, og at teir ætla sær at verja siðin.

Mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch sigur, at hann fekk kunnleika til hendingina tann 16. august, og at myndugleikarnir vórðu kunnaðir sama dag. Krtini hendir einki fyrr enn nú, skrivar The Independent.

# Sarah Palin var fyri at loysa Alaska frá USA

**Tað kann koma John McCain illa við, at tað er komið fram, at varaforsetaevni hansara hevur verið virkin í loysingarflokkinum í Alaska**

Okkurt kundi bent á, at republikanararnir hugsaðu seg ikki nóg væl um, áðrenn teir gjørdu av, at Sarah Palin skuldi stilla upp sum varaforsetaevni hjá John McCain. Í hvussu er hevur hon fingið nógv pláss í amerikonsku fjølmiðlunum teir seinastu dagarnar, og tað er ikki júst tann umrøðan, sum hon og McCain høvdu ætlað.

Fyrst kom fram, at ein 17 ára gomul dóttir hennara er við barn, og sambært amerikonskum fjølmiðlum samsvarar tað ikki serliga væl við sjónarmiðini hjá Sarah Palin um ungfólk og kynslív.

Nú hava fjølmiðlarnir eisini grivið fram, at Sarah Palin hevur verið virkin limur í flokkinum AIP, sum teir seinastu 30 árini hevur virkað fyri einari fólkaatkvøðu um at loysa Alaska frá USA. Slagorðið hjá flokkinum er "Alaska First - Alaska Always", og tað rímar illa við slagorðið hjá John McCain um "Country First", skriva fjølmiðlarnir.

Forkvinnan í AIP, Lynette Clark, sigur við ABC News, at tað er ófatiligt, at Sarah Palin skal stilla upp saman við John McCain, hvørs sjónarmið viðvíkjandi Alaska eru beint ímóti teimum hjá henni.

*Sarah Palin hevur verið virkin á loysingarvonginum í Alaska*
*Mynd: AP*



## Lieberman styðjar McCain

Fyrrverandi demokratiska varaforsetaevnið Joseph Lieberman kunngjørdi í gjárkvøldið, at hann styðjar republikanaran John McCain til forsetavalið í novembur. Í røðu á republikanska uppstillingarfundinum segði Lieberman, at eftir hansara tykki er John McCain tann rætti maðurin til amerikanska forsetaembætið, tí hann hevur drúgvar royndir og letur seg ikki trústa. Hann ásannaði, at Barrack Obama er skilagóður, og at hann uttan iva fer at gera nógv gott fyri USA seinni. Joseph Lieberman var demokratur, men situr í dag í Senatinum sum uttanflokkamaður.

## STUTT SAGT

### ES hevur mist sítt trúvirði

Russiska leiðslan heldur lítið um avgerðina hjá ríkis- og stjórnarleiðarunum í ES-londunum at hótta við at útseta avtalaðar samráðingar við Russland orsakað av kreppuni við Georgia. Ein russiskur diplomatur segði í gjár, at samtyktin hjá ES-leiðarunum vísir, at ES hevur ein størri trupulleika enn Russland í hesum máli.

- Hetta er meiri at revsa seg sjálvan heldur enn Russland, tí samtyktin økir ikki trúvirðið hjá ES, segði diplomaturin Vladimir Tsjizhov. Hann segði, at Russland hevur ikki størri tørv á samráðingum við ES, enn ES hevur, og tí bítir ES seg í halan við at útseta avtalaðar samráðingar. Mánadagin fara umboð fyri ES til Moskva at tingast við russar.



*Russiski forsetin, Dmitrij Medvedev, fær vitjan av ES-umboðum*
*Mynd: Polfoto*

### Vænta semju á Kýpros

Í morgin byrja samráðingar á Kýpros um eina varandi loysn á trætuni millum tann grikska og tann turkiska partin av oynni, og sambært vælvitandi keldum um hava útlitini fyri einari semju ongantíð verði betur enn júst nú. Stríðið hevur varty í meiri enn 30 ár og hevur verið ein av forðingunum fyri, at Turkaland kann sleppa upp í ES.

Fyri fýra árum síðani legði ST eitt semingsuppskot fyri tað grikska fólkið á Kýpros um at sameina teir báðar partarnar, men uppskotið fall. Í vár fingu teir griksku kýprarnir nýggja politiska leiðslu, og hon hevur síðani roynt at virka fyri einari varandi loysn.

Í morgin fara partarnir so til samráðingarborðið. Fyrrverandi avstralski uttanríkisráðharrin Alexander Downer situr við borðið sum serligt umboð fyri ST.